# Ikki trilvandi eftir forðingum, men við áræði leitandi eftir møguleikum



**- Vit hava funnið eina gongda rás við sáttmálanum við Ísland, men tað finnast fleiri ræsir. Tær finna vit bert við at hyggja upp – og hyggja út í heimin, segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður á Vinnuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum**

VINNURÁÐSTEVNAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta mikudag varð skipað fyri eini føroysk-íslendskari Vinnuráðstevnu í Norðurlandahúsinum, har løgmaður, Jóannes Eidesgaad, beyð vælkomin og Davið Oddson, sum er íslendskur uttanríkisráðharri, bar fram kvøðu.

Herluf Sigvaldsson, stjóri á uttanríkisdeildini á løgmansskrivstovuni, tosaði um innihaldið og týdningin av nýggja sáttmálanum, sum Føroyar og Ísland hava gjørt, og Grétar Már Sigurðsson, stjóri á handilspolitisku deildini í íslendska uttanríkismálaráðnum, tosaði um fríhandilsnet Íslands og EFTA.

Ráðstevnan byrjaði klokkan 14.30, og eftir kaffisteðgin um 15.30-tíðina hevði Jákup Jacobsen, sum rekur stórt handilsvirksemi í Íslandi og aðrastaðni, eina áhugaverda frásøgn um, hvussu hansara handilsvirksemið í Íslandi byrjaði.

Marita Rasmussen, sum starvast í Vinnuhúsinum, hevði síðan eina frágreiðing um samstarvsmøguleikar í fiskivinnuni, og at enda tosaði Illugi Gunnarsson, ráðgevi hjá íslendska uttanríkisráðharranum, um einskiljingar í Íslandi.

Væl av fólki nýttu høvi at lýða á framløgurnar í Norðurlandahúsinum, sum vóru lutfalsliga stuttar og neyvar.

Sosialurin fer í øðrum blaði at venda aftur til ymiskt av tí, sum var til umrøðu á ráðstevnuni, og í dag fara vit at endurgeva ein part av tí, sum løgmaður, Jóannes Eidesgaard, segði.

## Út í alheimsgerðina

Løgmaður helt fyri, at tað sanniliga eisini eru hugaligar løtur í politikki, og ein av hesum var løtan, tá ið nýggi sáttmálin millum Føroyar og Ísland varð undirskrivaður.

- Hetta er aftur eitt stig á leiðini at menna okkara búskap – at menna okkara land og enn eitt stig fram móti málinum at gerast ein virkin partur í altjóða búskapinum.

Hann segði, at handilssáttmálin við Ísland í roynd og veru er okkara fyrsta veruliga stig út í alheimsgerðina.

- Hvat líkar okkum betri enn at taka eitt slíkt stig saman við eini brøðratjóð? spurdi løgmaður.

Og Jóannes Eidesgaard helt fram:

- Kanska er hetta eitt lítið stig, vil onkur siga, tí hóast íslendski marknaðurin er seks ferðir størri enn tann føroyski, er hann tó lítil í heimshøpi. Sáttmálin er tó eitt stórt stig fyri tey, sum troyta teir møguleikar, sum liggja í sáttmálanum.

Hann vísti á, at tað er bara at lata eitt blað upp – ella tendra fyri útvarpinum – so fættist dagliga um landvinningar, sum íslendskar fyritøkur gera,



*Væl av fólki nýttu høvi at lýða á lutfalsliga stuttu og neyvu framløgurnar á føroysk-íslendsku Vinnuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum seinasta mikudag, har bæði føroyingar og íslendingar vóru á røðarapallinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*